## Georgia hevur argað tey stóru

Fleiri ferðir hevur Georgia fingið góð úrslit ímóti londum, sum er styrkismett nógv hægri enn Georgia.

Ein tann fyrsti minniligi sigurin hjá Georgia var í 1994, ta ið landið vann heili 5-0 ímóti Wales á hiemavølli. Í 1997 spældi Georgia javnleik 0-0 ímóti Italia, og árið eftir fekk Georgia eisini javnleik ímóti Russlandi. Í 2003 gjørdi Georgia tað bragd at vinna 1-0 á Russlandi, og í seinastu undankapping fekk landið javnleik ímóti Danmark.




## Rokna við meti í Aalborg

Tað gongur væl hjá AaB í superliguni, og tað sæst eisini aftur í talinum á áskoðarum, sum koma til dystirnar á heimavøllinum í Aalborg. Heimasíðan hjá AaB skrivar, at roknað verður við meti fyri hetta kappingarári á Aalborg Stadion sunnudagin. AaB skal spæla ímóti Randers FC, og helst verða tað fleiri enn 9.000 áskoðarar til dystin. Í AaB viðurkenna tey, at tað er støðan í toppinum á stigatalvuni sum ger, at áhugin fyri fótbóltinum er so stórur í løtuni. Føroysku spælararnir í AaB verða ikki við um vikuskiftið, tí teir eru báðir skaddir.

# Stjørnur gevast ella verða vrakaðar

**Beckham og Nistelrooy eru vrakaðir, Totti skal lokkast aftur á landsliðið, og Nedved sigur enn einaferð farvæl til kekkiska landsliðið. Europeisku landsliðini spæla venjingardystir í kvøld, og nógvir áhugaverdir dystir eru á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HM-endaspælið í Týsklandi er farið afturum, og fyri framman stendur ein nýggj undankapping til EM-endaspælið í 2008. Europeisku fótbóltslandsliðini eru farin undir síni fyrireikar til nýggju kappingina, og í kvøld spæla tey venjingardystir.

Onkrir dystir vórðu spældir longu í gjárkvøldið, og millum teirra var dystur millum Ísland og Spania í Reykjavík. Spanska legendan Raúl spældi sín landsdyst nummar 100, men hann kláraði ikki at gera mál í hesum dystinum. Tað kláraði heldur eingin av hinum spælarunum, og tí endaði tað við málleysum javnleiki.




*Pavel Nedved spælir í kvøld seinasta landsdystin fyri Kekkia.*
*Mynd: Scanpix*

Ukraina, sum er í bólki saman við Føroyum í EM-undankappingini, hitaði upp við einum stórsigri á Aserbadsjan. Kekkia vann dystin heili 6-0, og longu í hálvleikinum var støðan 4-0 til Ukraina. Dysturin gevur enn eitt dømi um, hvussu trupul útidysturin hjá Føroyum ímóti Ukraina kann gerast.

### Vrakaðar stjørnur

Nú nýggir landsliðsvenjarar eru settir í nógvum londum, hevur tað eisini við sær, at teir gera broytingar á sínum liðum. Nógvir spælarar verða ikki bidnir aftur, og summar av teimum størstu stjørnunum sleppa heldur ikki longur upp í part.

Tað hevur givið mest ekkó, at ein tann kendasti fótbóltsspælarin í heiminum, David Beckham, ikki longur kann brúkast á enska landsliðnum. Nýggi landsliðsvenjarin hevur valt at vraka Beckham, so hann kann staðfesta, at talan veruliga er um nýggja byrjan, nú venjarin hjá Onglandi ikki longur eitur Eriksson, men McLaren.

Ein annars kendur spælari, sum er vrakaður til venjingardystirnar í kvøld, er hollendski álopsspælarin Ruud van Nistelrooy, sum júst er seldur til Real Madrid fyri eina risastóra milliónaupphædd. Hann hevur longu sett hol á málskjótingina fyri spanska felag sítt, men hollendski venjarin Marco van Basten sigur seg ikki hava brúk fyri honum á landsliðnum.

### Nedved gevst

Meðan summi verða vrakaðir, eru tað aðrir, ið fáa høvi at gevast sjálvir. Ein teirra er Pavel Nedved, sum í kvøld spælir sín seinasta landsdyst fyri Kekkia. Eins og nógvar aðrar stórar stjørnur, er hetta ikki fyrstu ferð, at Nedved sigur farvæl til landsliðið. Tað gjørdi hann eisini í 2004, men hann kom upp í aftur 15 mánaðir seinni og spældi við í HM-endaspælinum í summar.

Nú hevur Nedved boða frá, at hann fer at leggja alla orku í at spæla fyri Juventus seinastu tvey árini av síni yrkisleið, og dysturin á heimavølli ímóti Serbia í kvøld, er tí tann seinasti hjá honum. Hetta er landsdystur nummar 91, sum hann spælir fyri Kekkia, og hann hevur í hesum dystum gjørt 18 mál.

### Totti aftur í blátt

Heimsmeistararnir úr Italia, sum eru í bólki saman við Føroyum í næstu undankappingini, spæla eisini venjingardyst í kvøld. Italia hevur fingið nýggjan venjara, eftir at Marcelo Lippi takkaði fyri seg eftir HM-gullið í Týsklandi. Nýggjur venjari er Roberto Donadoni, og hann vónar at lokka Francesco Totti aftur í bláu landsliðstroyggjuna.

Í dystinum ímóti Ukraina í kvøld gevur Donadoni nógvum ungum spælarum kjansin, og nógvir av teimum, sum vunnu HM í summar, eru als ikki við í hópinum hesaferð. Men teir skulu við aftur seinni, og Donadoni vónar, at eisini Totti, sum eftir HM segði seg ivast í síni framtíð sum landsliðsspælarin, kemur aftur á landsliðið.

Um tað eydnast Donadoni at fáa Totti aftur á landsliðið, fáa føroyingar møguleikan at síggja ein tann besta italska fótbóltsspælaran nakrantíð spæla í Føroyum næsta summar.

## Landsdystir í kvøld

**Nógvir venjingardystir verða spældir í kvøld. Millum dystirnar eru hesir:**

Danmark-Pólland
Ongland-Grikkaland
Kekkia-Serbia
Finland-Norðurírland
Norge-Brasil
Týskland-Svøríki
Italia-Kroatia
Bosnia-Frakland
Írland-Holland

# Ongin dystur í sjónvarpinum í kvøld

Kringvarp Føroya kundi ikki fáa svar fyrr enn í dag, um teir kundu vísa landsdystin millum Føroyar og Georgia á Svangasgarði í kvøld. Tað er ov seint, og tí verður ongin dystur at síggja í sjónvarpinum

Tað er týska fyritøkan Sport Five, sum umsitur rættindini til allar upptøkur av heimadystum hjá Føroyum. Kringvarp Føroya skal tí spyrja teir eftir, ella keypa loyvi frá teimum til at taka upp heimadystir hjá landsliði okkara.

Tað hevur Kringvarp Føroya eisini gjørt hesaferð, men Sport Five ikki kundi geva svar fyrr enn kl. 13 í dag. Tað er ov seint, og av tí sama verður ongin fótbóltur í sjónvarpinum í kvøld.

**-rwd**

## Tríggir EM-dystir í kvøld

Flestu av europeisku londunum spæla í kvøld venjingardystir sum fyrireiking til nýggju EM-undankappingina. Tríggir EM-dystir verða tó á skránni, og ein av teimum er dysturin millum Føroyar og Georgia.

Í Estlandi fara Estland og Makedonia at spæla fyrsta dystin í bólki E, og í Kazakhstan fer at vitja í Belgia í fyrsta dystinum í bólki A.

Tann 2. september, tá ið Føroyar spæla á útivølli ímóti Skotlandi, byrjar undankappingin av álvara, og tað verður spælt í øllum bólkunum.

## Írski landsliðsvenjarin hóttir

Írski landsliðsvenjarin Steve Staunton fekk ein ordans kvøkk mánakvøldið. Írlandi fyrireikar seg til venjingardyst ímóti Hollandi í kvøld, og mánakvøldið fór Staunton út í túnið frammanfyri gistingarhúsið í Dublin, har írska landsliðið býr. Har kom ein maður stunandi ímóti honum við pistóli á lofti. Stauton flýggjaði innará gistingarhúsið aftur, og løtu seinni handtók løgreglan mannin. Einki verður sagt um orsøkin til, at maðurin hótti írska landsliðsvenjaran, og írska fótbóltssambandið sigur, at hóast Staunton fekk ein ordans kvøkk, er hann klárur til landsdystin í kvøld.

## McClaren til arbeiðis

Í kvøld spælir Ongland fyrsta landsdystin, eftir at Steve McLaren var settur í starvið sum landsliðsvenjari. Talan er um ein venjingardyst ímóti Grikkalandi, sum verður spældur á Old Trafford í Manchester.

– Vit mugu líta afturá og læra av okkara mistøkum. Tað er avgerandi fyri okkum, sigur Steve McLaren undan dystinum og sipar til hálvvánaliga enska avrikið undir HM í Týsklandi í summar.